







hjá Torbjørn, sum eitt nú á Heystframsýningini í fjør sýndi fram fleiri verk við heitinum "Málarin og modellin", har klassiska myndevnið varð nýtt sum høvið til at halda litveitslu. Og eftir teimum nýggju myndunum at døma heldur litveitslan áfram, men nú tykist Torbjørn í størri mun enn áður rannsaka rúmdarmøguleikarnar í teimum stóru kompositiónunum. Í báðum modelmyndunum síggjast fleiri kvinnuskap, ið eru sett perspektiviskt á flatuna, soleiðis, at tað aftasta kvinnuskapið er minni enn tað fremra osfr. Samstundis leggja tey mongu ymislittu pensilsstrokini dent á flatan og tað tilfarsliga í myndini, meðan ein ljósur fýrkantur togar eygað enn longur inn í myndarúmið. Hvørt hesin fýrkantur myndar eitt vindeygað, eitt hol ella ein spegil er fyri so vítt líkamikið Hann veitir ljós, rúmd og ró í myndabygnaðinum, samstundis sum hann víðkar um rúmdarmøguleikarnar í myndunum. Á ein hátt minna hesar nýggju modelmyndirnar bæði um barokkmeistaran Velazquez og hansara spæl við dýpd og áskoðara, eins og Picasso og hansara kollveltandi frýr úr Avignon eisini koma til hugs.

## Tað bókmentaliga

Torbjørn Olsen skal eins og ein annar stórur føroyskur koloristur, Ruth Smith hava myndevnið framman fyri sær, meðan hann málar. Tá hann hevur livandi fólk framman fyri sær, hendir beinanvegin ein rúgva í málningunum. Í sambandi við altartalvurnar hevur hann fingið bróðurin og vinfólk at standa fyri sær í teimum ymisku bíbilsku leiklutunum, meðan hann málar. Honum dámar ikki at verða nevndur bókmentaligur málari; ein illustrator, ið málar søgur hjá øðrum. Men samstundis kann staðfestast, at hann sum altartalvumálari veruliga fær nógv burtur úr Bíbliusøguni. Torbjørn nýtist ikki ræðast tað bókmentaliga, sum ongantíð verður til ivaleysa illustratión av søgum hjá øðrum. Í hansara málningum verður bókmentaliga søgan tulkað til eina ekspressiva, listarliga søgu, sum ofta tykist beinleiðis snúgva seg um iva. Mynd hansara av Kristus í grøvuni lýsir t.d. ein steindeyðan persón; fer hann nakrantíð at vakna aftur? Ivin er menniskjaligur og grundleggjandi og líðingarsøgan er full av ivaløtum, ið tala til iva listamansins um listarliga skapan. Ikki er vist, at Torbjørn fer at halda fram við líðingarsøguni, men tað verður spennandi at fylgja Torbjørn í næstum, tí tær nýggju stóru rúmkompositiónirnar tykjast sum skaptar til stórar søgur. Nú er eitt sindur síðan Torbjørn hevði serframsýning heima í Føroyum og meðan vit bíða eftir eini slíkari, kunnu vit gleða okkum til Heystframsýningina, har Torbjørn er limur, og sum letur upp í næstum, tann 23. septembur.